# Nevin vann steyp í øðr

**Hóast Havnin tapti flestu fótbóltsdystirnar á ólavsøku, so vann Havnin eitt ferðasteyp í einum øðrvísi dysti leygarkvøldið fyri ólavsøku, tá tvey lið - Nevin og Bob'arin - takklaðu, sparkaðu, bannaðu og østu seg um dómaran, í einum dysti har fotbóltsskil og vit ikki var sterkasta vápnið**




***Aftast frá vinstru:** Jógvan Kruse, Jón Clementsen, Høgni Fagraberg, Finnur Jensen, Jákup Andreas Thomsen Petur Mohr Niclasen, Ólavur Dalsgarð, Roar Gyldenkærne Dalsgarð, Ísak Sambleben, Rúni Korsgaard. **Fremst frá vinstru:** Rúni Johannesen, Martin Andreas Kruse, Óli Olsen (liggjandi), Sveinur Dam (liggjandi), Michael Jensen. Ári Danielsen, Páll Oddur Lamain Rubeksen, Torkil Rasmussen og Bogi Højgaard vænta á myndini*

Tað er leygarkvøld í Gundadali og veðrið er avbera gott. Á niðara vølli renna nakrir ungir menn og hugna sær. Tað gongur kanska ikki so væl at raka bóltin og motorikkurin er ikki tað, sum vit eru von við at síggja á einum fótbóltsvølli. Men tað verður lagt nógv fyri og menn eru eitt nú skjótir at rópa eftir dómaranum, júst sum í ordiligum mannfólkafótbólti. Men hvørjir eru so hesir ungi menninir, ið tuska runt av øllum alvi í Gundadali.

### Nevin

- Áhugafelagið Nevin er ein forsamling av ungum havnarmonnum, sum ein lagnudag í maj 2004 valdu at gera ein felagskap. Vit kendust allir frammanundan, men hetta lagnukvøldið sótu vit í plantasjuni, har sum hasjarnir plagdu at halda til, og drukku. Her komu vit so við tí hugskoti at stovna áhugafelagskapin Nevin. Har høvdu vit so stovnandi fund. Nú royna vit at hittast javnan til jólafrokastar og onnur tiltøk. Nú spæla vit so eisini fótbólt, sigur Finnur Jensen, ið eisini er kendur úr tónleika bólkinum, Páll Finnur Páll.

### Bob'arin

Nakað eftir at Nevin er stovnaður, hittast nakrir ungir menn í einum kjallara til ein bob-kapping.

- Bob'arin er eisini ein áhugafelagskapur, ið roynir at gera vanlig leygarkvøld til meir enn bara vanlig leygarkvøld. Vit savnaðust eina ferð í 2005 til eina bob-kapping og harfrá kemur navnið Bob'arin. Hetta gjørdist til eitt afturvendandi tiltak og 31. mai í 2007 høvdu vit so stovnandi fund á Manhattan. Vit hittast til eitt nú tunnusláttur, yvirskeggja ball og námsferð, sigur John Hansen, sum vit eisini kenna úr fótbóltsheiminum.

### Upprunin til ólavsøkudystin

Hetta er fjórða árið á rað, at Nevin og Bob'arin hittast til ein fótbóltsdyst, men hvussu kom tað í lag, at áhugafeløgini skulu bresta saman á vøllinum?

- Dysturin kom í lag í Myspace tíðini. Vit gjørdu okkum ein profil og so sóu vit, at har var ein eitt annað áhugafelag, sum æt Bob'arin. Tað hildu vit lítið um og hugsaðu bara at hetta var eitt kopi av okkum. Tað endaði við eini rivalisering, har tað onkursvegna koma uppá tal, at vit skuldu spæla ein fótbóltsdyst fyri at finna tað betra áhugafelagið. At byrja við var tað næstan fíggindaskapur millum áhugafeløgini, men nú er tað ikki so longur. Eitt nú hittast vit allir í kvøld og fara at hugna okkum saman, sigur Finnur Jensen.

> **- Áhugafelagið Nevin er ein forsamling av ungum havnamonnum, sum ein lagnu dag í maj 2004 valdu at gera ein felagskap**
>
> - FINNUR JENSEN UM NEVAN

### Nógv stendur uppá spæl

Í 2007 og 2008 vann Nevin ferðasteypið, men í fjør fekk Bob'arin fyri fyrstu ferð sítt navn á ferðasteypið í spennandi 4-3 sigri. Dystirnir verða spældir í tíðarskeiðinum rundan um ólavsøkuna, men soleiðis var ikki fyrstu ferð.

- Fyrstu ferð var í 2007. Tá spældu vit um veturin og tað var gler á vøllinum. Bara helmingurin av okkum hevði gaggur. Tá funnu vit skjótt útav at spæla um summarið, sigur Finnur Jensen.

Hvat meir enn hetta vælsignaða ferðasteypið stendur upp á spæl fyri Bob'arin og Nevan?